Direct Level

Nýggja Keldan tikin í nýtslu!

Rás 2 sendir beinleiðis alt vikuskiftið frá Kelduni í Skálafirði, í samband við at nýggi bygningurin verður vígdur.

Á skránni verða almenn møti, bibliutímar við gestatalarum, og familjumøti.

Leygardagin 4. september kl. 17 verður eitt serligt alment møti, har umboð fyri kommunustýrini við Skálafjørðin, løgtings- og landsstýrismenn úr Eysturoynni, og umboð fyri fyritøkur og einstaklingar, ið hava stuðlað byggingini, eru boðin at verða við.

Leygarkvøldið kl 21.00 verður serligt ungdómstiltak har m.a. Direct Level fer at spæla.

Vit hoyra eisini tónleik og stuttar samrøður í samband við møtini. Sí annars skránna í Varpinum.

Á Rás 2 fríggjakvøldið til sunnukvøldið 3.-5. september

ÚF

Morgunlestrar
6.–11. september

Birgitte Johannesen, prestur, lesur

Sálmar:

Mánadagin 6. september:
nr. 220 Ber hátt titt høvur, øll kristin tjóð
Jóhs. 15,26

Týsdagin 7. september:
nr. 241 Kom tú, Guðs heilagi, skapandi andi
Jóhs. 14,26
nr. 236 Tin andi, Guð, til Jesus Krist meg kalli

Mikudagin 8. september:
nr. 516 Ljósið rann av kærleiks runni
2. Tim. 1,7
nr. 520 Sólin hevur sama lag

Hósdagin 9. september:
nr. 234 Sannleikans andi, lat sannleikans ljós títt os skína
Jóhs. 16,13
nr. 336 Kom, sannleikans andi, vitni ber

Fríggjadagin 10. sept.:
nr. 476 O, Harri, hvønn skulu vit fara til?
Róm. 8,14–17
nr. 481 Tykist tað í neyð og pínu

Leygardagin 11. sept.:
nr. 323 O, kristni tú alt
Ez. 11,19 og 20

Vika 36 – 1. septemb.
Vinnaratøl: **08 - 14 - 24 - 40 - 46 - 48**

Eykatøl: **16 - 27**

Supertal hesa vikuna: **27**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+ eykatal	**58.081,- kr.**
5 vinnaratøl:	**4.068,- kr.**
4 vinnaratøl:	**116,- kr.**
3 vinnaratøl:	**38,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

GJALDOYRAKURSIR

Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum		**25.08.04**	**Ultimo aug. 2004**
USA	**Dollarar**	615,5000	614,1500
Bretland	**Pund**	1105,3800	1101,1100
Svøríki	**Króna**	81,2300	81,5000
Noreg	**Króna**	89,4500	88,5400
Sveits	**Frankur**	482,7600	482,1100
Ísland	**Króna**	8,5100	8,4900
Kanada	**Dollari**	469,9400	466,1000
Japan	**Yen**	5,5829	5,5904
	Evra	743,5900	743,8000

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ



Vinnari:

Bogi Lützen
Undir Brúnni 5
700 Klaksvík

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: ANDSPERRA

A	L	K	O	H	O	L	Í	S	M	A	N				A	A
N	O	R	G	E		E		Í		L	O	N	G	U	R	
T	R	O	N	G	S	T	Ø	D	A		V	Í				A
A	A		A	N	Í	T	R	A	S	-	D	A	N	S		G
B	N		R	Í	L	L	A	R		O	K	A			P	O
U	S	A	F		D	A	R	Í	U	S				P	A	N
S	E	D	O	V		N			N		U	R			R	Í
T	N		R	A		D	A	N	G	A	N			M	A	T
A	D	O	N	Í	S		N	Ó	A		P	U	N	D		
B	Í		Ø	N	U	N	D	A	R	S	O	N			Í	M
L	S		V	Ø	K	U	R			P	S			U	S	A
E	T	Í	N		U	L	A	N	-	B	A	T	O	R		N
T	Ø	M		Ø	R	V	S	E	N		U	R	A	N		
T	D		S	S		A	S		P	E	R	A	N			A
386 Í	T	A	K	A			G		L				U	P	P	
A	N	T	R	A	C	Í	T	K	O	L		A	S	Í	A	

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

387

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- **Rura** - *Póra Póroddsdóttir*
- **Havið** - *Bogi Hansen*
- **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt

FILMSTEIGURIN

Shrek 2

Og so livdu tey lukkuliga í allar ævir…, men ikki heilt, tí brádliga verða trøllini, Shrek og Fiona, boðin til foreldur hennara. Shrek veit, at tað ikki er lætt at skula hitta verforeldrini – serliga tá tey eru kongur og drotning. Og ikki minst, tá tey hava hildið, at lítla Fiona skuldi verða bjargað av einum vøkrum prinsi, sum bjargaði henni frá gandi og gjørdi hana til eina vakra prinsessu.

Hjálpari teirra, asnin, er alt fyri eitt til reiðar at fylgja og stuðla teimum á ferðini, og hesum fáa tey eisini tørv á. Gumman hjá Fionu er sum vera man vónbrotin, tí Fiona ikki giftist soni hennara, og kongurin verður so í øðini, at hann sendir ein leigudrápsmann eftir Shrek.

Shrek 2 tekur við, har eitt'arin slepti. Ein parodi upp á hópin av kendum ævintýrum og filmum, og har kongaríkið Langt, Langt Burturi í óvanliga stórt mát líkist Beverly Hils. Andrew Adamson hevur aftur leikstjórna, og sum høvuðsroddir hoyra vit m.a. Mike Myhers, Eddie Murphy og Cameron Diaz. Í donsku útgávuni eru tað Amin Jensen, Jan Gintberg og Mille Lehfelt, sum hava høvuðsleiklutirnar.



Frumsýning – Billettprísur: 55,- kr.
Við danskari talu

Fríggjadagin 03.09.	kl. 15³⁰	Fríggjadagin 03.09.	kl. 17³⁰
Fríggjadagin 03.09.	kl. 19⁰⁰	Leygardagin 04.09.	kl. 15³⁰
Leygardagin 04.09.	kl. 17³⁰	Leygardagin 04.09.	kl. 19⁰⁰
Sunnudagin 05.09.	kl. 15³⁰	Sunnudagin 05.09.	kl. 17³⁰
Sunnudagin 05.09.	kl. 19⁰⁰		

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P **Tlf. 311956** P
www.bio.fo



Frumsýning – Billettprísur: 55,- kr.
Við enskari talu og donskum teksti

Fríggjadagin 03.09.	kl. 17⁰⁰	Fríggjadagin 03.09.	kl. 19³⁰
Fríggjadagin 03.09.	kl. 21³⁰	Leygardagin 04.09.	kl. 17⁰⁰
Leygardagin 04.09.	kl. 19³⁰	Leygardagin 04.09.	kl. 21³⁰
Sunnudagin 05.09.	kl. 17⁰⁰	Sunnudagin 05.09.	kl. 19³⁰
Sunnudagin 05.09.	kl. 21³⁰		

Fríggjadagin 03.09. kl. 21⁰⁰ Leygardagin 04.09. kl. 21⁰⁰
Sunnudagin 05.09. kl. 21⁰⁰

Fríggjadagin 03.09. kl. 23³⁰ Leygardagin 04.09. kl. 23³⁰
Sunnudagin 05.09. kl. 23³⁰

P **BIO KIOSKIN** P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.